VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Møtt: Eyðdis H. Niclasen, Albert Ellefsen Elin Doris Dam, Rósa Samuelsen, Dánjal Thomsen Jens Gaardlykke, Jóhannis Joensen, Jonhard Joensen Jórun Haraldsen, Dánial Johansen og Dagbjørn Hansen.
Skrivari: Georg Hansen.

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 39 | Kærur frá grannum um bygging á matr. rn. 12bi í Miðvági. | 1 |
| 40 | Val av teknisku nevnd | 2 |
| 41 | Áhugafelagið Heimdalur søkir um stuðul til keyp av bátinum Heimdalur | 3 |
| 42 | Felagid Vágar - Umsókn um skeltaverkætlan | 4 |
| 43 | Umsókn um loyvi at laða gróttrappu Úti á Bakka 12, matr. 321 í Sandavági | 5 |
| 44 | Diana Magnusdóttir søkir um byggiloyvi á matr. 208n í Miðvági | 6 |
| 45 | Lukket punkt: Alment wc í Miðvági | 6 |
| 46 | Miðstaðarøki í Miðvági | 9 |
| 47 | Broyting av kommunustýrisskipan fyri Vága kommunu | 11 |


**2017-0-5**

### 39. Kærur frá grannum um bygging á matr. rn. 12bi í Miðvági.

**Málsfrágreiðing**

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
|---|---|
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Í sambandi við bygging á matr. nr. 12bi í Miðvági (Rasmusargøta 11), er komið fram, at húsini eru komin at standa ov høgt.
Grannar hava gjørt vart við, at støðan á økinum sær ikki rætt út og kommunan hevur eftirmált hæddirnar.
Niðurstøðan er, at húsini eru komin at standa 90cm ov høgt.
Ein samskiftismistak í sambandi við áseting av planeringshædd er orsøkin til mistakið.
Eigarin av matr. rn. 12bi er ikki partur av mistakinum, sum er íkomið.
Húsini eru innilokað og arbeiðið at innrætta húsini er byrjað.
Umsitingin hevur havt kunnandi fund við grannarnar, tann 14. mars 2017, har málið var lýst. Notat liggur í málinum.
Nevndin fer á staðið áðrenn málið verður viðgjørt. Tekniski leiðarin lýsir málið.

**Tilmæli 15. marts 2017, pkt. 49:**
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at taka støðu til um byggingin skal lógliggerast juridiskt, ella skal fáa fysiskar avleiðingar.

**Tekniska nevnd, 15. marts 2017, pkt. 49:**
Málið umrøtt.
Nevndin mælir til at geva loyvi til frávik í byggimálinum á matr. nr. 12bi í Miðvági.

**Tilmæli 16. marts 2017, pkt. 34:**
Mæla til at taka undir við Teknisku Nevnd.

**Fíggjarnevnd, 16. marts 2017, pkt. 34:**
Viðmælt

### Avgerð

Kunnað var um málið.
Grannahoyringar vera gjørdar.

**2016-02-13**

## 40. Val av teknisku nevnd

### Málsfrágreiðing

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Val av teknisku nevnd

**Býráðið, 10. november 2016, pkt. 3:**
Samtykt at velja Dagbjørn Hansen, Heðin Poulsen, Jonhard Joensen, Dánjal Thomsen og Dánial Johansen.
Varalimir: Eyðdis Hartmann Niclasen, Jens Gaardlykke, Albert Ellefsen, Rósa Samuelsen og Jórun Haraldsen.

-------------------

Nýggi listi ynskir at gera broytingar í umboðan teirra í teknisku nevnd. Í Kommunustýrislógini kapittul 6, stk. 4 stendur: Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali. Neyðugt er tí at velja nevndina av nýggjum.

## Avgerð

Samtykt at velja Dagbjørn Hansen, Jens Gaardlykke, Jonhard Joensen, Dánjal Thomsen og Dánial Johansen.
Varalimir: Eyðdis Hartmann Niclasen, Heðin Poulsen, Albert Ellefsen, Rósa Samuelsen og Jórun Haraldsen.

**2017-23-6**

## 41. Áhugafelagið Heimdalur søkir um stuðul til keyp av bátinum Heimdalur

## Málsfrágreiðing

Áhugafelagið Heimdalur søkir um stuðul til keyp av bátinum Heimdalur. Báturin fæst til keyps fyri kr. 300.000,-. Áhugafelagið hevur fingið til vega kr. 150.000,- frá privatum stuðlum og heitir nú á kommununa um at vera við til at stuðla.

**Tilmæli 9. marts 2017, pkt. 38:**
Mælt verður til at taka støðu til umsóknina.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 9. marts 2017, pkt. 38:**
Mælt verður til at veita kr. 25.000,- í stuðuli.

Mælt verður til at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini 16. marts 2017, pkt. 29:

**Fíggjarnevnd, 16. marts 2017, pkt. 29:**

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Viðmælt

**Avgerð**

Mælt verður til at veita kr. 25.000,- í stuðuli.

**2017-53-1**

## 42. Felagid Vágar - Umsókn um skeltaverkætlan

### Málsfrágreiðing

Visit Vágar søkir um loyvi og stuðul til eina skeltiverkætlan við kunningarskeltum í Vágoynni. Skeltini eru ikki liðugt sniðgivin, men ynskjast framleidd sambært sniðhandbókini fyri skelti, sum Ferðaráð Føroya hevur skrivað í 2003.
Í Vága kommunu verður talan um 8 skelti í fyrstu atløgu. Skeltini skulu setast fyri hvørja bygd, umframt á støðum, sum eru áhugaverd hjá ferðafólki at vitja. T.d. Trælanýpa, Trøllkonufingur, Rúnarsteinurin í Sandavágs kirkju o.s.fr.
Vága kommuna fær 8 skeltir sum tilsamans kosta kr. 68.720,-.

**Tilmæli 9. marts 2017, pkt. 41:**
Eingin peningur er avsettur til endamálið.
Mælt verður til at taka støðu til umsóknina.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 9. marts 2017, pkt. 41:**
Mælt verður til at veita stuðul.

**Tilmæli 10. marts 2017, pkt. 47:**
Mælt verður til at geva loyvi til at seta skeltini upp í samráð við teknisku deild.

**Tekniska nevnd, 10. marts 2017, pkt. 47:**
Samtykt at geva loyvi til at seta skeltini upp í samráð við teknisku deild.

**Mælt verður til at avseta pening á eykaætlan 1. 16. marts 2017, pkt. 33:**
Mælt veður til at taka undir við Mentunar- og Trivnaðarnevndini.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**Fíggjarnevnd, 16. marts 2017, pkt. 33:**
Viðmælt, treytað av at skeltini kunnu tola alt veður.

**Avgerð**

Samtykt at veita stuðul og geva loyvi til at seta skeltini upp í samráð við teknisku deild.

**2017-42-17**

## 43. Umsókn um loyvi at laða gróttrappu Úti á Bakka 12, matr. 321 í Sandavági

### Málsfrágreiðing

Ósbjørn Jacobsen arkitektar søkja, vegna Atla og Eydnu Gregersen, um loyvi at gera gróttrappu móti matr. nr. 321 í Sandavági (úti á Bakka 12).
Talan er um ovara pakkhúsið, hvørs eystara síða stendur á mark móti kommunalum vegi, sum er ein uml. 4 m breiður. Vegurin er stongdur fyri bilferðslu.
Trappan skal eftir ætlan koma í staðin fyri einar timburtrappur, sum hava verið atgongd til pakkhúsið umvegis eina hurð miðskeiðis á fasaduni.
Trappurnar skulu eftir ætlan laðast av gróti. Trinini venda norðureftir, soleiðis at tær koma at taka upp til 1,2m av vegabreiddini. Á hini síðuni av vegnum er lágur laðaður garður.
Vísandi til, at vegurin er stongdur fyri koyrandi ferdslu (og at aðrar timburtrappur hava verið har), væntast ikki, at trappurnar koma at vera ein trupulleiki fyri almennu atkomuna á vegnum.

**Tilmæli 10. marts 2017, pkt. 36:**
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at játta loyvi til at gera trappurnar á kommunalum øki, við treyt um eina mest loyvdu breidd á 1,2m, og at kommunan tilskilar sær rætt til økið aftur, um tað skal brúkast til annað endamál.

**Tekniska nevnd, 10. marts 2017, pkt. 36:**
Viðmælt.

**Avgerð**

Samtykt.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**2017-42-10**

## 44. Diana Magnusdóttir søkir um byggiloyvi á matr. 208n í Miðvági

### Málsfrágreiðing

Diana Magnusdóttir søkir um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 208n í Miðvági.
Lýsing av byggimálsviðgerd liggur í málinum.
Umsitingin hevur heitt á tann, sum teknar húsini, um supplerandi upplýsingar og er málið tí ikki klárt til endaliga støðutakan.
Tó er ynski um frávik til byggilinju, sum nevndin eigur at taka støðu til.
Talan er um frávik á 0,5m á nordara marki og 1m frávik á sunnara marki.
Umsitingin hevur ábendingar um, at eigarar av onkrum av hinum stykkjunum í útstykkingini eisini ynskja frávik til byggilinjur.

**Tilmæli 10. marts 2017, pkt. 38:**
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at taka støðu til møguligt frávik til byggilinjur í útstykkingini.

**Tekniska nevnd, 10. marts 2017, pkt. 38:**
Nevndin ynskir ikki at gera frávik til byggilinju móti vegi.
Tó metir nevndin at norðara byggilinja fyri matr. nr. 208m, 208n og 208o kann ásetast 2,5m frá marki.

### Avgerð

Samtykt.

**2014-44-57**

## 45. Lukket punkt: Alment wc í Miðvági

### Málsfrágreiðing

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Í Miðvági er einki alment wc. Formaðurin í teknisku nevnd Johannes Ellefsen hevur biðið Kristin Ellefsen verkfrøðing um at koma við einum uppskoti um, hvar rættast er at gera alment wc í Miðvági. Kristin hevur gjørt nøkur uppskot um plasering.

**Umsitingin mæli til, 13. januar 2015, pkt. 2:**

at gjøgnumganga uppskotið og umrøða fyrimunir og vansar.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 13. januar 2015, pkt. 2:**

Mælt verður til at kanna møguleikan fyri at gera eitt wc við gomlu kommunuskrivstovuna í Miðvági og eitt á kommunala økinum frammanfyri handilin hjá Føroya Tele.

**Tekniska nevnd, 16. januar 2015, pkt. 1:**

Mælt verður til at umhugsa at seta alment wc á hesi pláss:

1. Við síðuna av gomlu kommunuskrivstovuni.
2. Á kommunala økinum frammanfyri handilin hjá Føroya Tele.
3. Á Tormansbakka niðanfyri hjá Elidu Niclasen.

**Býráðið, 26. januar 2015, pkt. 10:**

Samtykt at gera kostnaðarmeting av at gera wc við gomlu kommunuskrivstovuna.

Jógvan Hans Hansen byggifrøðingur hevur gjørt 3 uppskot, hvussu wc kann gerast. Støða skal takast til uppskotini.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 7. mai 2015, pkt. 42:**

Mælt verður at gera kostnaðarmeting av uppskoti 3.

**Tekniska nevnd, 8. maj 2015, pkt. 81:**

Samtykt at broyta uppskot 3, so bygningurin hevur høga reising, og síðan bjóða arbeiðið út millum handverkarar í kommununi.

---

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Síðani nevndirnar viðgjørdu málið í maj 2015, hava ymiskar umstøður gjørt, at málið er ikki farið víðari.

Í sambandi við bygnaðarbroytingar á tekniska økinum, er nýggi leiðarin fyri Húsavarðartoymið vorðin ein partur av málinum, og er nýtt uppskot komið á borðið.

Skotið verður upp, at flyta staðsetingina av almenna wc-bygninginum til matr. nr. 163d, sum er grøna økið millum bygdaskúlan í Miðvági og Leitisveg. Hetta er eisini økið, har Miðstaðarøkið í Miðvági væntandi verður gjørt og kann eitt alment wc integrerast í hesi verkætlan. Uppskotið umfatar, at bygningurin verður bygdur í sama stíli sum tað, sum stendur í miðstaðarøkinum í Sandavági. Tekningarnar eru tøkar. Húsavarðartoymið kann standa fyri byggingini. Kr. 100 tkr. eru avsettar á konto 3131 rs 61010 (Alment wc) og mett verður, at arbeiðið kann gerast innanfyri hesa játtan.

**Tilmæli 19. februar 2016, pkt. 26:**

Umsitingin mælir Teknisku nevnd til at heita á Býráðið, umvegis Fíggjarnevndina, um at seta arbeiðið í gongd og fíggja av á konto 3131 rs 61010 (Alment wc).

**Tekniska nevnd, 19. februar 2016, pkt. 26:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevnd, 24. februar 2016, pkt. 12:**
Taka undir við umsitingini og Teknisku nevnd.
**Býráðið, 29. februar 2016, pkt. 12:**
Samtykt at flyta vesið heim til Miðvágs Skúla.
----------
Í sambandi við at umraðfestingar eru gjørdar í verkætlanini við miðstaðarøkinum í Miðvági, er neyðugt endaliga at staðseta nýggja almenna vesið.
Arbeiðið at seta bygningin við Miðvágs skúla byrjaði síðst í 2016. Økið er grivið av og ein rottangi er komin á staðið. Hann er tó ongantíð settur niður og arbeiðið steðgaði m.a. tí ein granni var ónøgdur við staðseting, sum sær høg út, tí rottangin er ikki settur niður á rætt stað. Eisini er samtykt at bíða við at arbeiða við Lítla Fløtti, sum part av miðstaðarøkinum, tí annað økið er raðfest í staðin. Neyðugt er at taka støðu til, hvørt staðsetingin av wc-bygninginum skal fasthaldast.

Tekniski leiðarin mælir í fyrsta lagi til at halda fast í verandi staðseting.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Um ein onnur staðseting til wc skal finnast miðskeiðis í bygdini, mælir tekniski leiðarin til, at næst-prioriteraða plaseringin (á almenna økinum yvirav kirkjugarðinum í Miðvági) verður realisera í 2017, og at arbeiða víðari við alternativari staðseting til 2018.
Á henda hátt kann eitt alment wc verða gjørt í 2017.

**Tilmæli 10. marts 2017, pkt. 42:**
Tekniski leidarin mælir Teknisku nevnd til at taka støðu til málið.

**Tekniska nevnd, 10. marts 2017, pkt. 42:**
Mælt verður til, at í 2017 verður alment wc sett á kommunala økið frammanfyri matr. nr. 341 í Miðvági (yvirav kirkjugarðinum).

### Avgerð

Samtykt at seta vesið á Lítla Fløtt.

**2014-47-41**

## 46. Miðstaðarøki í Miðvági

### Málsfrágreiðing

Fleiri uppskot fyriliggja um eitt miðstaðarøki í Miðvági. Býráðið hevur savnað hesi uppskot og biðið Torben hjá Hjálpirót taka samanum og koma við einum heildaruppskotið.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 9. apríl 2015, pkt. 40:**
Mælt verður til at arbeiða víðari við heildarætlanini, men seta fokus á at gera Lítlafløtt fyrst.

**Tekniska nevnd, 10. apríl 2015, pkt 57:**
Mælt verður til at arbeiða víðari við heildarætlanini, men seta fokus á at gera Lítlafløtt fyrst.

**Fíggjarnevndin, 13. apríl 2015, pkt. 45:**
Nevndin bleiv kunnað um ætlanina.
----------
Skitsuuppskot til miðstaðarøkið í Miðvági var lagt fram á Vágafagnaðinum 5. mars 2016. Eftirfylgjandi eru smáar tillagingar gjørdar, millum annað grundað á viðmerkingar frá borgarum á Vágafagnaðinum.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Kunnað verður um verkætlanina og um hvat eftir ætlan verður gjørt í ár innanfyri fíggjarkarmarnar í 2016.

**Tilmæli 19. august 2016, pkt. 114:**
Umsitingin mælir Teknisku nevnd til at taka kunningina til eftirtektar.

**Tekniska nevnd, 19. august 2016, pkt. 114:**
Tikið til eftirtektar.

---------------------------------------------------------------------------

Jens Gaardlykke og Jórun Haraldsen hava lagt fram nýtt uppskot, har mælt verður til at byrja arbeiðið inni í viðarlundini.

**Tilmæli 19. januar 2017, pkt. 11:**
Mælt verður nevndini til at taka støðu til ætlanina og gera sítt tilmæli til teknisku nevnd.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 19. januar 2017, pkt. 11:**
Samtykt at bjóða Torben hjá Hjálpirót vestur sum skjótast at tekna broytingarnar inn í heildarætlanina um miðstaðarøki.
Neyðugt er at fáa loyvi frá friðingarmynduleikunum til arbeiðið í ósanum.
Neyðugt er at fáa loyvi frá Skógrøkt Landsins um arbeiði í viðarlundini.

**Tilmæli 20. januar 2017, pkt. 8:**
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at taka støðu til málið.

**Tekniska nevnd, 20. januar 2017, pkt. 8:**
Ein meiriluti (Dagbjørn Hansen, Jonhard Joensen, Heðin Poulsen og Dánjal Thomsen) taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.
Ein minniluti (Dánial Johansen) tekur ikki undir við at Lítli Fløttur verður tikin úr ætlanini.

-----------

Hjálpirót hevur gjørt uppskot um, hvussu arbeiðið milum Miðvágs Skúla og viðarlundina kann gerast.

**Býráðið, 30. januar 2017, pkt. 20:**
Samtykt at arbeiða víðari við hesi ætlanini.
Samtykt beinanvegin at søkja friðingarmynduleikarnar og Skógrøkt Landsins um neyðug loyvir.
Dánial Johansen tekur ikki undir við. at Lítlifløttur ikki verður gjørdur til Vestanstevnuna.

-----------------------

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
|---|---|
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Umsitingin hevur søkt Skógrøkt Landsins, Friðingarmynduleikarnar, Magn og Fornminnismynduleikarnar um loyvi at fremja ætlanina umframt at ástaðarfundir hava verið. Skógrøkt Landsins hevur givið loyvi, meðan hini ikki enn hava svarað.

**Tilmæli 9. marts 2017, pkt. 36:**
Umsitingin mælir til

- at áarbakkin verður lagdur við stórum steinum, bert ein steinur í hædd og at ongar klípur vera lagdar millum steinarnar soleiðis, at síl sleppa inn ímillum teir at fáa skjól.
- at spuliplenan og brúgvavangarnir við síðuna av henni verða tikin burtur.
- at brúgvavangin móti tí gomlu brúnni verður laðaður við mosagróti.
- at trappan og brúgvavangin móti teirri nýggjaru brúnni verður laðaður við skotnum gróti, sum kommunan eigur á goymslu.
- at arbeiðsfólk hjá kommununi ger laðingararbeiðið.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 9. marts 2017, pkt. 36:**
Mælt verður til at fylgja tilmælinum við teirri broyting, at báðir brúgvaveingirnir verða laðaðir við mosagróti. Mælt verður til at brúka grótið, sum liggur í útstykkingini á Suðuroyartrøðni og Gutthústrøð.

**Tekniska nevnd, 10. marts 2017, pkt. 46:**
Nevndin tekur undir við Mentunar- og Trivnaðarnevndini.

### Avgerð

Samtykt.

**2017-00-1**

## 47. Broyting av kommunustýrisskipan fyri Vága kommunu

### Málsfrágreiðing

Upposkot um at broyta kommunustýrisskipanina fyri Vága kommunu soleiðis:

**Vinnu- og Havnanevndin**

§ 16. Vinnu- og Havnanevndin hevur 5 limir, ið allir skulu vera býráðslimir.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Stk. 2. Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av teimum kommunalu uppgávunum, ið ikki hoyra undir aðra nevnd ella samstørv, ið viðvíkja almanna- og heilsuøkinum.

Stk. 3. Vinnu- og Havnanevndin tekur sær av:

1. Vinnumálum m.a.

    Marknaðarføring

    Vinnuøkir

2. Ferðavinnumál m.a.

    Felagið Vágar

3. Havnum m.a.

    Havnir

    bátahyljar

    lendingar

    Strandalinjan

**Býráðið, 28. februar 2017, pkt. 28:**
Samtykt.

**Avgerð**

Samtykt.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. marts 2017 kl. 15:26 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**Bók lisin Fundur lokin**

Eyðdis H. Niclasen

Rósa Samuelsen

Jonhard Joensen

Jóhannis Joensen

Dánjal Thomsen

Albert Ellefsen

Elin Doris Dam

Jens Gaardlykke

Dagbjørn Hansen

Jórun Haraldsen

Dánial Johansen